## Eg meini tað



**Óla Jákup Rólantsson, útvarpsmaður**

# Grafitti

Lítið mundi australski bushmaðurin gruna, har hann allogin og framyvirboygdur við einum vocabulari uppá nøkur fá einstavilsisorð kom dragsandi konuna eftir hárunum, at nøkur ártúsund seinni skuldi kvøldarítriv hansara heima í holuni eftir at eldurin var uppfunnin gerast eitt altjóða multimilliónа bussiness. Og lítið mundi hann gruna, at pr. 24. mars ár 2000 eftir Kristi føðing vóru ikki færri enn 17.563 útbjóðarar á Alnetinum, sum livdu av at forkoma og reinsa burtur eftiraping eftirkomaranna eftir júst hansara kvøldarítrivi.

Grafitti kom hvørki við litkritinum ella málingaspraydósini. Sambært nøkrum serfrøðingum á økinum var holubúgvin meira framkomin í sínum speiandi karikaturum av sínum umhvørvi, enn hip-hop-kultururin er tað í dag í gráu smogum New Yorks.

Men grafitti gjørdist ikki alheims kent fyrrenn í okkara tíð. Kanska tað byrjaði við nátthúsfilosoffunum, sum kroystu onkur hissini veingjaði orð úr sær afturvið eini óflýggjaligari tekning, meðan teir nú kortini gjørdu burturav sær. Kanska var tað Kilroy, sum ongantíð gloymdi at skriva “Kilroy was here” – og fekk øll onnur at gera tað sama – sum var upprunin.

Grafitti varð ikki viðurkend list. Tað var ungdómsins mótmæli. Tað var ljótt, dálkandi og altíð málað har, sum tað ikki skuldi málast, ella har, sum málað var frammanundan. Fólk endaðu í samfelagstænastu og í fongsli fyri grafitti. Ameriskar kvinnur stovnaðu mammufeløg móti grafitti. Californisku fongslini vóru á tremur av ungdómi á høgum listarligum støði, sum bert tørvaði eitt lørift og ein sýnisglugga.

Samfeløg høvdu ørandi útreiðslur av grafitti. Sápuverksmiðjurnar blómaðu, ameriskir dómarar settu smákriminellar útaftur á gøturnar at arbeiða fyri kommunurnar sum vaskikonur, ið royndu framkomna tøkni, til tess at vaska ivasomu listina burtur avaftur býnum. Ein heilur sjálvfóðrandi ídnaður tók seg upp — ungdómurin málaði grafitti, varð fongslaður, onnur fingu samfelagstænastu at reinska býirnar, og sápu- og málingaframleiðarar gnýggjaðu sær lógvarnar.

Sumstaðni eystanfyri sóu býirnir í fjarstøðu út sum abstraktir málningar, í onkrum muslimskum landi var effektivasti stopparin settur fyri ólevnaðinum, tá onkur hevði dittað sær at svansa ein annars halgan húsavegg til við spraymáling. Hondin varð høgd av! Bardagin móti grafitti gjørdist ein multimilliónaforrætning — men so var tað onkur flutti mottoið hjá læknunum um at fyribyrgja, heldur enn at viðgera, yvir á grafitti. Hví ikki bara viðurkenna grafitti sum list og leggja eina miðvísa útbúgving inn í skúlarnar? Knappliga arbeiddu óargadýrini fyri kommunurnar, dekoreraðu tokstøðir, tunnlar, barnagarðar og ó- ella illa málaðar býarpartar. Og fingu teir løn fyri tað sama, teir høvdu sitið í fongsli fyri!

Men bardagin er ikki av. Ídnaðurin, hvørs endamál var at forkoma grafitti, er ein sjálvmótsøgn í sjálvum sær — tí er einki grafitti, so hevur hesin ídnaður onga inntøku. So mammufeløgini arbeiða víðari, sápan blívur alt meira avanserað, og tíggjutúsundatals listarverk verða dagliga vaskað niður í kloakkir stórbýanna. Men grafitti er nú viðurkend list, einamest borin uppi av sínum egna kulturi — hip-hop-kulturinum. Nútíðar bushmaðurin í New York hevur fingið sínar egnu holur at mála. Hvørja viku útlisiterar býurin garðar og veggir til listarmennirnar. Onkunstaðni er reglan, at “the public decides” — er listarverkið vælumtókt, verður tað standandi — er tað ikki, so fær næsti bushmaðurin høvi at mála útyvir eftir næstu kommunalu útbjóðing. Akkurát sum tá australski bushmaðurin onkuntíð slepti hestahalanum hjá konuni og málaði ein dingo útyvir eina kenguru — tí dingoin var hægri í metum akkurát tann dagin, hann hevði sligið ein til deyðis til døgverða.

Ein fyrrverandi føroyskur fiskimálaráðharri hugsaði helst ikki um grafitti, tá hann einaferð tosaði um hømiliu. Hann hevði roynt øll gomul heimaráð og alla nútímans tøkni — men hømiliurnar vuksu treiskt uppaftur á hvørjum ári. Hann segði: “Tá einki bítur á hesum ókrútinum, hví kunnu vit so ikki bara alment viðurkenna hømiliuna sum eina prýðisplantu?” Í yvirførdum týdningi skuldi hetta kanska givið onkrum nakað at hugsa um.

Kom bara soleiðis hissini at hugsa um hetta, nú ein av próvgrundunum fyri ikki at gera tunnil undir R.C. Effersøesgøtu við SMS var, at ungdómurin fór at svansa tunnilin til við grafitti.

**GEISLAVIRKNI.** Útlátið av geislavirknum evnum frá Sellafield-verkinum í Englandi, kann mátast í føroyskum sjógvi Danski umhvørvismálaráðharrin er í øðini um, at útlátið frá Sellafield kann geva fólki grund til at seta spurning við fiskavørur úr Norðurlondum



**Svend Auken er firtin um, at geislavirkni frá Sellafield-verkinum í Englandi kann gerast ein hóttan móti fiskavørum úr Norðurlondum**

# Hóttanin úr Sellafield

*Eyðun Klakstein*

– Vit kunnu góðtaka, at geislavirkið útlát frá Sellafield-verkinum í Englandi kann fáa fólk at seta spurnartekin við góðskuna av til dømis fiskavørum úr Norðurlondum.

Hetta skrivar danski umhvørvis- og orkumálaráðharrin, Svend Auken, í eini kronikk í danska blaðnum Aktuelt.

Svend Auken er sera firtin um útlátið frá Sellafield, sum kann mátast heilt norður í Arktis. Eisini í føroyskum og grønlendskum sjógvi ber til at máta geislavirkni, sum stavar frá Sellafield.

Seinastu tíðina hevur nóg rok verður um Sellafield í Englandi. Bretska kjarnorkueftirlitið hevur almannagjørt tríggjar frágreiðingar, sum funnist harðliga at trygdini og arbeiðsgondini á Sellafield

Tað hevur rættiliga fingið gongd í kjakið um verkið, og higartil hevur tað havt við sær, at stjórin á Sellafield og nógv starvsfólk hava fingið sekkin.

### Felags norðurlendsk áheitan

Í Írlandi er eisini stór øsing um Sellafield, sum liggur 90 kilometrar frá írsku strondini.

Tað eru serliga írar, sum hava verið raktir av útlátinum frá Sellafield-verkinum, men tað er ikki bara í Írlandshavinum, at geislavirknið kann mátast.

Norðurlendsku umhvørvismálaráðharrarnir høvdu í februar mánaði fund um Sellafield-verkið. Eisini føroyski landsstýrismaðurin, Eyðun Elttør, var við á hesum fundi.

Tá avgjørdu ráðharrarnir, at teir skuldu senda eina felags norðurlendska áheitan til bretsku myndugleikarnar. Teir kravdu, at viðurskiftini á Sellafield verða fingin í rættlag, og teir vístu á óttan fyri, at útlátini kunnu gera stóra skaða – bæði fyri umhvørvi og útflutning hjá norðurlondum.

– Danmark hevur verið við í arbeiðnum at fáa skil á eystureuropisku kjarnorkuverkini, men upplýsingarnar um støðuna á Sellafield vísa, at trupulleikin ikki bara finst í eystureuropa, skrivar Svend Auken í kronikkini.

### Danskt uppskot

Danmark hevur nú tikið stig til, at eitt uppskot verður lagt fyri sokallaðu OSPAR-kommisiónina, har øll lond við strond til Norðuratlantshavið samstarva um at verja havumhvørvi.

Í hesum uppskoti verður mælt til, at minkað verður um geislavirknað útlátið í havið.

Svend Auken hevur talað fyri uppskotinum hjá enska orkumálaráðharranum, og hann hevur sagt honum, at uppskotið ikki skal takast sum kritikkur av ensku myndugleikunum, men sum eitt úrslit av ótta fyri umstøðunum á Sellafield-verkinum.

Ætlanin er, at minkingin av geislavirknum útlátið í havið skal minka støðugt næstu 20 árini, so tað verður so at siga burtur til ta tíð.

Enn hevur føroyskur útflutningur ikki kent sviðan av útlátinum frá Sellafield, men norðurlendsku ráðharrarniar ætla ikki, at hetta skal gerast aktuelt. Tí hava teir tikið eitt felags tak fyri at fáa skil á viðurskiftunum á Sellafield-verkinum.

2'arin
**Tíðindablaðið Sosialurin**. **Postadressa:** Postboks 76, 110 Tórshavn. **Telefon:** 311820. **Telefax:** 314720.
**Email til 2'aran:** eydun@sosialurin.fo. **Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller. **Blaðstjórn:** Eyðun Klakstein.
**Layout og uppseting:** Tíðindablaðið Sosialurin.



# Aftur í fortíðina at grópa



**Svartabók vísti, at stórveldini høvdu áhuga fyri Føroyum og føroyskum viðurskiftum. Nú skulu kanningar eystanfyri gevafleiri upplýsingar um tað, sum fór fram í og kring Føroyar undir kalda krígnum**

**KALT KRÍGGJ.** Nú verður aftur sett gongd í kanningarnar av leiklutinum hjá Føroyum undir kalda krígnum. Nú skulu leitast eftir skjølum eystanfyri, so greiða kann fáast á sovjetisku ávirkanini í Føroyum

*Eyðun Klakstein*

Nú verður farið í holt við at leita eftir skjølum í eystureuropeiskum goymslum, og tey skulu vera við til at lýsa føroysku støðuna undir kalda krígnum.

Frammanundan er longu ein kanning gjørd í skjalagoymslum í Føroyum, Danmark og USA, men tann lýsingin skal ikki standa einsamøll, og tí verður eisini farið eystur um tað horvnað jarntjaldið at leita eftir upplýsingum um føroysk viðurskifti.

Løgtingið játtaði í vikuni 400.000 krónur til framhald av hernaðarkanningini, og løgmaður segði við Sosialin mikudagin, at farið verður í gongd við kanningina beinanvegin.

Ætlanin var annars, at arbeiðið at kanna hernaðarligu støðu Føroya undir kalda krígnum ongantíð skuldi steðga, men ætlaða játtanin til kanningina mátti avlýsast, tí løgtingið skar játtanina til Løgmansskrivstovuna (sum stendur fyri kanningini) við hálvari millión.

Einasta ætlanin, sum kundi steðgast, var hernaðarkanningin, sigur løgmaður.

Arbeiðið hjá útoyggjanevndini varð tikið fram um hernaðarkanningina, men nú hevur løgtingið játtað løgmansskrivstovuni eina eykajáttan, so farast kann undir at finna skjøl eystanfyri.

400.000 krónur eru tøkar til arbeiðið í ár, og tað er nóg mikið til at seta arbeiðið í gongd. Men tað skulu fleiri pengar úr almennu pengamappuni, áðrenn kanningin verður liðug. Løgmaður sigur, at søkt verður aftur um eina játtan á fíggjarlógini næsta ár.

Løgmansskrivstovan skal nú gera eitt uppskot til, hvussu kanningin skal skipast fram yvir.

– Stýrisbólkurin, sum stóð fyri Svørtubók, er ikki til longur, og eingin arbeiðssetningur er fyri framhaldið av kanningini. Tað er hetta, sum vit skulu fáa upp á pláss næstu dagarnar, sigur Sigmund Isfeldt, fulltrúi á Løgmansskrivstovuni.

Hann sigur, at farið verður í gongd við kanningararbeiðið, so skjótt sum arbeiðssetningurin er gjørdur og fólk eru funnin at standa fyri arbeiðnum.

Í næstu viku verður vónandi uppskot til arbeiðssetning og annað latið løgmanni, sum varðar av kanningini.

### Mæltu til framhald

Løgtingið samtykti í apríl 1996, at kanningar skuldu gerast í amerikanskum skjalagoymslum, fyri at lýsa føroysku støðuna undir kalda krígnum.

Løgmaður setti ein stýrisbólk at standa fyri hesum arbeiði. Í bólkinum sótu Rúni Joensen, sum var formaður, Jóannes Dalsgaard, Jóan Pauli Joensen og Jákup Thorsteinsson.

Sámal Tróndur F. Johansen gjørdi kanningar í USA, og hann skrivaði ein frágreiðing út frá skjølunum, hann fann har. Hendan frágreiðing var helvtin av Svørtubók, meðan Jákup Thorsteinsson stóð fyri hinari helvtini, sum var bygd á kanningar í Ríkisskjalasavninum í Keypmannahavn.

Í Svørtubók verður dentur lagdur á, at talan er um eina ávegisfrágreiðing, og stýrisbólkurin mælir í Svørtubók til, at kanningararbeiðið heldur fram.

Stýrisbólkurin helt, at um tað gekk væl við kanningararbeiðinum og játtan fekst til vega, kundi løgmaður hava eina endaliga frágreiðing á heysti í ár. Men hetta verður ikki veruleiki. Væntandi er, at kanningararbeiðið heldur fram langt inn í næsta ár.

### Ivasamt við russiska opinleikanum

Jákup Thorsteinsson sigur í samandráttinum av kanningini »Hernaðarmál og politikkur«, at frágreiðingin skal lesast við fyrivarni, tí støðan er ikki lýst frá øllum sjónarhornum.

– Mangt av tí, sum er skrivað í hesi frágreiðing (»Hernaðarmál og politikkur, blðm.) kann seinni verða – um ikki beinleiðis broytt – so tó sæð og skilt í víðari samanhangi og úr fleiri sjónarhornum, skrivar Jákup Thorsteinsson.

Vit ætlaðu at tosa við Jákup Thorsteinsson um Svørtubók og framhaldið av kanningararbeiðnum, sum millum annað hann higartil hevur staðið fyri, men hann ynskti ikki at tosa við okkum um hetta. Hann vísti til Løgmansskrivstovuna, sum umsitir kanningina.

Svartabók vísti, at NATO hevði stóran áhuga fyri føroyskum viðurskiftum, og illgrunin um, at Føroyar høvdu ein leiklut í kalda krígnum, varð staðfestur. Svartabók sigur, at í skjølunum, sum eru funnin í Danmark og USA, sæst aftur, at Sovjettsamveldið eisini hevði áhuga fyri føroyskum viðurskiftum.

Fyri at fáa javnvág í frágreiðingina og at sleppa undan eini einvegis frágreiðing úr vestureuropeiskum skjølum, skal kanningararbeiðið halda fram, so eisini skjøl úr Russlandi og eystureuropa annars verða funnin fram.

– Vit vita ikki, hvørjum skjølum vit sleppa fram at í Russlandi, tí har er ikki sami opinleiki, sum í til dømis USA. Tí vita vit ikki, hvussu umfatandi kanningararbeiðið verður, og hvussu langt vit kunnu koma, sigur Sigmund Isfeldt, fulltrúi á Løgmansskrivstovuni.

Men gongst sum ætlað, kemur størri javnvág í lýsingina av føroysku støðuni undir kalda krígnum, tá kanningararbeiðið eystanfyri er liðugt.